# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg havi so ongan tíð upplivað, at ein dystur, sum verður spældir í góðum ítróttaranda, fær áskoðararnar at rópa ókvæmisorð*

*Jákup Eli Olsen, FS Vágar 2004*

# Skammast sum føroyingar



*Tað ber ikki til, at alllur moralur og etikkur verður skúgvaður til viks, tá tú fert út á vøllin, sigur Jákup Eli Olsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Hetta, sum gongur fyri seg í dag, kann slettis ikki góðtakast. Sjálvt í venjingardystum eru spælarar, sum leggja eftir mótstøðumonnum, bara tí hesir hava øðrvísi húðarlit. Til tíðir beinleiðis skammast vit við at vera av sama uppruna sum nakrir av spælarunum á vøllinum, siga Jákup Eli Olsen og Jan C. Dam**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jákup Eli Olsen telist millum teir royndu í føroyskum fótbólti. Longu í 1989 spældi hann fyri fyrstu ferð á besta B68-liðnum, og umframt dystir í B68 og HB, hevur onkur einstakur landsdystur eisini verið á skránni. Í dag virkar hann sum hjálparvenjari hjá FS Vágum. Har er ein onnur føroysk fótbóltskempa, Jan C. Dam, eisini venjari, báðir øtast teir um viðferðina, sum summir av útlendsku spælarunum hjá liðnum fáa.

- Tað er at kalla í hvørjum dysti, at spælarar heilt tilvitað niðurgera onkran av útlendsku spælarunum. Um hetta er vorðið verri seinnu árini, skal ikki siga. Fyrstu árini, sum eg spældi, vóru fáir og eingir útlendingar í føroyskum fótbólti. Hartil fært tú kanska meira og meira við av tí, sum fyriferst á vøllinum, so hvørt sum tú eldist. Og sum venjari eri eg kanska eisini meira tilvitaður um hetta. Og til dømis var talan um púrasta óskiljandi atburð, sum onkur av spælarunum hjá B36 sýndi, tá vit spældu móti teimum leygardagin, sigur Jákup Eli.

- Men fyribrigdi við at niðurgera onnur, er avgjørt ikki nýtt. Tað hava altíð verið spælarar, sum hava nýtt allar midlar, fyri at traðka á mótstøðuna. Og í alt ov stóran mun verður hetta bara góðtikið. Ikki minst eru tað spælarar, sum eisini eru berandi kreftir og kanska enntá landsliðsspælarar, sum ganga á odda í hesum, og tá rakar tað eyka hart. Sum fótbóltsspælari í fremstu føroysku røð, so ert tú samstundis eitt slag av fyrimynd hjá nógvum ungdómum. Og tí kann tað ikki góðtakast, at alt, sum eitur moralur og etikkur, verður lagt til viks, tá farið verður út á vøllin. Argumentið við at "júmen hann kallaði meg… heldur ikki eitt einasta pettið. Vit eru hóast alt vaksin fólk, og ikki skúlabørn í yngru flokkunum.

- Tí Føroyar eru ikki størri enn so, at tú helst skalt kunna hyggja í eyguni á tínum mótspælara, tá dysturin er av, siga teir báðir.

### Skammast sum føroyingar

Sum venjari er ábyrgdin fyri atburðinum hjá spælarunum sjálvandi størri, enn tá tú ert spælari. Og hvørki Jan og Jákup Eli krógva, at hetta er nakað, sum nervar. Bæði á og uttan fyri vøllin.

- Meðan dysturin er, mugu vit og liðið annars nýta kreftir til annað enn spælið. Tí vit mugu eisini ansa eftir, at okkara spælarar ikki missa høvdið.

- Men tað ringast er kortini aftaná. Tað eru veruliga støður, har vit bara púrasta erligt mugu siga, at vit skammast av at vera landsmenn við onkrar av mótspælarunum. Tú kanst ikki bera í bøtuflaka fyri ein spælara, sum støðugt rópar ókvææmisorð eftir einum mótspælara við tí einasta endamálið, at hesin skal fara púrasta niður sálarliga.

### Skal loysast á vøllinum

Trupulleikin við rasismu á vøllinum hevur verið frammi nakrar ferðir seinnu árini. Seinasta tá venjarin hjá LÍF fekk ein dag leikbann fyri sína orð móti einum ÍF-spælara.

Enn tykist tó vera avmarkað, hvussu stórum álvara trupulleikin er tikin í, men Jákup Eli hevur sína meining um, hvat eigur at